# Bush og Kerry mugu bíða




*Mynd: Reuters*

**Aftur hesaferð er tað ein einstakur statur, sum avger amerikanska forsetavalið. Seinast var tað Florida. Nú er tað Ohio. Men Bush er nær við**

VAL Í USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

George W. Bush hevur næstan tryggjað sær fýra ár afturat í Hvítu Húsunum í Washington, men tað kunnu ganga fleiri dagar, áðrenn tað endaliga svarið frá veljarunum er greitt.

Orsøkin er at finna í statinum Ohio. Gjáramorgunin vildu tvær av teimum stóru sjónvarpsstøðunum vera við, at Bush hevði vunnið í Ohio, men hinar støðirnar søgdu tað vera so javnt ímillum tey bæði valevnini, at einki kundi sigast við vissu. Sambært CNN hevði Bush fingið 125.000 atkvøður fleiri enn John Kerry, men av tí at meiri enn 250.000 brævatkvøður ikki vóru taldar, bar ikki til at staðfesta nakað úrslit.

Og úrslitið kemur heldur ikki enn, tí myndugleikarnir í Ohio boðaðu í gjár frá, at tann endaliga uppteljingin verður ikki liðug fyrr enn um ellivu dagar. Demokratarnir hava samstundis gjørt greitt, at teir ætla sær at stríðast fyri hvørjari einastu atkvøðu í statinum.

– Hetta hevur verið ein long nátt. Í fyra ár hava vit bíðað eftir sigrinum, og vit eru til reiðar at bíða eftir úrslitinum. Vit fara at stríðast fyri hvørjari einastu atkvøðu, segði varaforsetaevnið hjá Kerry, John Edwards, í gjár.

Tað er tó ikki vist, at Bush, forseti, fer at bíða eftir úrsitinum í Ohio. Í gjár segði ein av talsmonnum hansara, at vísir tað seg, at forsetin hevur vunnið í statunum Nevada og New Mexico, fer hann væntandi at kunngera, at hann hevur vunnið valið. Men tá gongur hann út frá, at hann fer at vinna í Ohio, tá uppteljingin har er liðug.

## Kann enda javnt

Undan fínteljingini í fleiri statum í gjár hevði George W. Bush vunnið í 27 statum og Kerry í 19. Bush hevði tryggjað sær 249 valmenn og Kerry 242. Vinnur Bush í Ohio, og vinnur Kerry endaliga í statunum Nevada, Wisconsin, Iowa og New Mexico, verður úrslitið 269-269.

Verður úrslitið javnleikur, skal Umboðsmannatingið velja forsetan, og har hava republikanararnir so mikið stóran meiriluta, at tað er eingin ivi um, at so heldur Bush fram, skrivar Reuter.

Tað er heldur eingin ivi um, at fleiri amerikanarar hava valt Bush enn Kerry. Sambært fyribilstølunum í gjár hevði forsetin fingið næstan fýra milliónir fleiri atkvøður enn avbjóðarin.

## 43 greið úrslit

Sambært CNN er eingin ivi um úrslitið í 43 statum. Bush hevur vunnið í Alaska, Colorado, Arizona, Florida, Louisiana, Mississippi, Kansas, Indiana, Georgia, Kentucky, West Virginia, Tennessee, Alabama, Oklahoma, South Carolina, North Carolina, Virginia, Nebraska, North Dakota, South Dakota, Texas, Wyoming, Utah, Arkansas, Missouri, Montana og Idaho.

Kerry hevur vunnið í New Hampshire, Washington, Oregon, Maine, Vermont, Massachusetts, Connecticut, New Jersey, Delaware, Illinois, Rhode Island, Maryland, Pennsylvania, California, New York og District of Colombia (Waschington D.C.).








*Mynd: Reuters*

# Republikanararnir størri meiriluta í Kongressini

**Republikanski flokkurin hevur styrkt sína støðu bæði í Senatinum og í Umboðsmannatinginum**

VAL Í USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Demokratarnir fingu als ikki tað burtur úr kongressvalinum, sum teir høvdu væntað. Undan valinum høvdu demokratarnir 48 av teimum 100 sessunum í Senatinum, og hesaferð høvdu teir sett sær fyri at fáa meirilutan har.

Men so varð ikki. Tað eydnaðist demokratunum at fáa tann svarta Barack Obama valdan í statinum Illinois, og hann verður tann enasti svarti senatorurin. Undan valinum umboðaði republikanarin Peter Fitzgerald Illinois í Senatinum, men hann varð noyddur at taka seg aftur aftan á eina gølu um kynsligan ágang.

Men í Georgia vann republikanarin Johnny Isakson senatssessin frá demokratinum Zen Miller. Ikki tí, demokratarnir fara neyvan at sakna hann, tí hann hevur fleiri ferðir atkvøtt saman við republikanarunum, og hann mælti eisini sínum veljarum til at atkvøða fyri George W. Bush. Í South Carolina, North Carolina og Louisiania máttu demokratarnir eisini lata republikanararnar fara við senatssess-unum.

Í Suður Dakota er stórur spenningur um tað endaliga úrslitið, tí har stendur á jøvnum ímillum demokratiska senatorin Tom Daschle og republikanska avbjóðaran John Thune. Hetta var heldur óvæntað, tí Daschle hevur verið formaður í senatsbólkinum hjá demokratunum.

Eisini í Umboðsmannatinginum standa republikanararnir sterkari aftan á valið. Har hava teir fingið fýra tinglimir aftuat.

Úrslitini í Senatinum og Umboðsmannatinginum gera, at tað verður uppaftur lættari hjá George W. Bush at fáa undirtøku fyri sínum lógaruppskotum har. Um hann vinnur valið.

# USA má arbeiða saman við umheiminum

**Forsætisráðharrarnir í Danmark og Noregi halda, at USA eigur at leggja størri dent á altjóða samstarv í komandi forsetaskeiði**

VAL Í USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir hava ikki viljað gjørt viðmerkingar til, hvør eftir teira tykki átti at vinna amerikanska forsetavalið, men nú valið hevur verið, siga Anders Fogh Rasmussen og Kjell Magne Bondevik, at í næsta forsetaskeiðinum má USA leggja størri dent á at samstarva við umheimin.

– Vit hava brúk fyri einum USA, sum arbeiðir meiri saman við sínum sameindu, sama hvør at enda vinnur valið, segði danski forsætisráðharrin við TV2 í gjár.

Eisini norski forsætisráðharrin vónar, at USA fer at reka ein øðrvísi uttanríkispolitikk tey næstu fýra árini.

– Vit hava fingið ein spenning ímillum Evropa og USA, meðan Bush hevur verið forseti. Verður hann afturvaldur, vóni eg, at hann fer at byggja brýr, og at hann fer at økja samstarvið við altjóða felagsskapir, segði Kjell Magne Bondevik við tíðindastovuna NTB.

– Vinnur Bush, nýtist honum ikki at hugsa um at verða afturvaldur eina ferð afturat, og tað kann gera, at hansara politikkur verður øðrvísi nú, legði norski forsætisráðharrin afturat.

## Atkvøddu um samkynd

Umframt at velja forseta, Umboðs-mannating og 34 sessir í Senatinum skulu veljararnir í fleiri amerikonskum skatum taka støðu til ymsar aðrar spurningar, nú teir kortini vóru í valhølinum.

Í ellivu statum vildu myndugleikarnir hava at vita, um fólk tóku undir við at loyva samkyndum hjúnaløgum. Spurt varð, um myndugleikarnir skuldu seta eitt ískoyti í galdandi lóg, soleiðis at tað verður staðfest, at hjúnalagið er ímillum mann og kvinnu.

Atkvøtt varð í statunum Ohio, Georgia, Mississippi, Michigan, North Dakota, Arkansas, Montana, Utah, Kentucky, Oklahoma og Oregon, og allastaðni var svarið, at ískoytið skal setast inn í lógina.

Sjálvt í Oregon, har 3.000 samkynd vórðu gift í vár, var meiriluti fyri ískoytinum, men har var munurin lítil.